VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Fleyr til gul av eystri, seinnapartin upp í andøvsgul av landnyrðingi. Sirm ella mjørki, men eisini onkur sólglotti. Hitin millum 9 og 12 stig.



Veðrið hósdagin:
Fleyr til gul av ymsum ættum og stundum regn ella mjørki. Hitin millum 10 og 13 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Gul til stívt andøvsgul av norði og landnyrðingi og regn eitt skifti, annars támut veður. Hitin millum 10 og 13 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Lot til andøvsgul av vestri og útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 9 og 13 stig.

Tey byrja tíðliga

Hesi bæði smáu hava tíðliga brotið upp um armar. Í góðveðrinum ein av døgunum høvdu tey sett sær fyri at økt um formúuna

HANDIL
Leo Poulsen
leo@sosialurin.fo

Kanska býr ein lítil Ejler Jacobsen, ein Poul Mohr ella kanska ein lítil Ingvør Nolsø í hesum báðu smáu. Í hvussu er tykjast tey tíðliga hava ment ein business-sans – og tey eru heldur ikki bangin fyri at byrja í tí smáa.

Nú um dagarnar kom eitt av starvsfólkunum á Sosialinum framvið hesum báðum, og viðkomandi var kvikur at finna myndatólið fram.

Børnini høvdu gjørt seg væl út. Undir skamlinum sæst ein djúpur borðiskur, so tey høvdu gjørt seg út at verða har eina tíð. Hungurin skuldi so ikki dríva tey til húsar aftur.

Eisini høvdu tey tryggjað sær, at partur av vørunum ikki skuldi fúka burtur í lotinum.

Annars sá út til, at tey høvdu innstillað seg upp á suðurlendskar tilstandir, tí eingi prísskelti vóru at síggja, og tað merkti helst, at tey vóru til reiðar at »prutta« um prísin.

Tað eydnaðist ikki blaðnum at fáa við, hvussu sølan hepnaðist hjá hesum báðum hendan dagin, men tey hava vónandi fingið enn meiri blóð á tonnina at herja á eina aðru ferð.

Kanska er hetta ein komandi Kitty May Ellefsen ella ein nýggjur Hanus Hansen? Og um ikki, so hugnaðu hesi bæði sær kortini væl við síni »makeshift« sølubúð
Mynd: Birgir Waag Høgnesen

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	5
Nuuk	--
Qaqortoq	6
Ammassalik	6
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	12
Seyðisfjørður	9
Tórshavn	9
Lerwick	13
Aberdeen	13
London	19
Tromsø	--
Bergen	19
Oslo	--
Stokkhólm	17
Keypmannah.	17
Helsinki	21
Moskva	21
Berlin	20
Warzawa	19
Kiev	23
Bukarest	31
Paris	20
Madrid	26
Róm	25
Malorca	31
Athen	31
Malta	28
Tunis	34
Beijing	31
New Dehli	34
Bangkok	32
Jakarta	30
Sydney	18
New York	22
Miami	30
Los Angeles	22
Meksikobýur	23
Panama	--
La Paz	12
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	13

LUFTTRÝSTIÐ

Í gjár:
Eitt lágtrýst, 987 hPa. vestan fyri Hebridurnar fer spakuliga eystureftir og grynnist. Brúgvalagið við Føroyar verður á okkara leiðum komandi samdøgur.

Í dag:
Lágtrýstið yvir Skotlandi fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið við Føroyar stendur mestsum í stað.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 1/7 kl. 06^{00} – 2/7. 06^{00}. Hitin í gjár: 9,7°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,0 mm – mált frá 1/7 kl. 06^{00}– 2/7 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í juli: 8,0 mm



VESTFALLSKYRRINDI

24. juni	Máni ongst frá jørðini
30. juni	Fullmáni
7. juli	Seinna kvarter
	Jørðin longst frá sólini
9. juli	Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2007

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	Suðuroyar-/Vágafirði sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	Hestfirði/Sundalagnum sp.	Vestmannasundi fp.	Vestmannasundi sp.	Mykinesfirði fp.	Mykinesfirði sp.	Nólsoyarfirði fp.	Nólsoyarfirði sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði sp.	Hvannasundi fp.	Hvannasundi sp.	Fugloyarfirði fp.	Fugloyarfirði sp.
3. Juli	09.44	22.06	08.44	21.06	08.59	21.21	11.44	-	00.21	12.44	07.59	20.21	06.59	19.21	09.59	22.21	10.59	23.21	09.29	21.51	10.44	23.06
4. Juli	10.28	22.49	09.28	21.49	09.43	22.04	00.06	12.28	01.06	13.28	08.43	21.04	07.43	20.04	10.43	23.04	11.43	-	10.13	22.34	11.28	23.49
5. Juli	11.10	23.30	10.10	22.30	10.25	22.45	00.49	13.10	01.49	14.10	09.25	21.45	08.25	20.45	11.25	23.45	00.04	12.25	10.55	23.15	-	12.10
6. Juli	11.51	-	10.51	23.26	11.06	23.41	01.30	13.51	02.30	14.51	10.06	22.41	09.06	21.41	-	12.06	00.45	13.06	11.36	-	00.30	12.51
7. Juli	00.26	13.00	-	12.00	-	12.15	02.26	15.00	03.26	16.00	11.15	23.50	10.15	22.50	00.41	13.15	01.41	14.15	00.11	12.45	01.26	14.00